## Stórt familjutiltak í Argja Skúla

Í morgin, leygardagin 3. mars kl. 14 til 17 verður stórt familjutiltak í Argja Skúla. Tiltakið er til frama fyri uttanlandsferð hjá 8.a í Argja skúla.

Flokkurin í Argja skúla fer á vitjan í Skotlandi í mai. Millum tað nógva áhugaverda, ið flokkurin skal gera í Skotlandi, er vitjan hjá einum skúlaflokki í Peterhead. Eins og farið verður til Aberdeen og Edinburgh. Ætlanin er eisini at fara til Loch Ness og sigla á vatninum.

Fyri at fáa pening til vega til ferðina verður skipað fyri stórum familjutiltaki í Argja skúla, leygardagin 3. mars kl 14 til 17. Her verður nakað fyri allar aldursbólkar, tað sigst, at tey, ið eru farin um brúnna seinastu dagarnar hava kent angan av kakunum, ið eru bakaðar til køku og mattombola. Esini verður bommtombola, ponyríðing, hoppiborg, fiskibrunnur, skreiðirør, svampakast og ikki minst lutaseðlasøla við nógvum góðum vinningum. Til tey, ið vilja hava eina friðarliga løtu, verður eisini skipað fyri café við nýbakaðum vaflum og kaffi.

8.a á Argjum vónar, at tikið verður væl undir við hesum stóra tiltaki.

Marita Dalsgaard, sjónleikari:

# Kann ikki vera skapandi



Sosialurin

**Hon er sannførd um, at valið av yrki er tað rætta fyri hana. Tá hon hevur verið heima í longri tíð, vil hon sleppa til arbeiðis: – Eg toli ikki – ikki at vera í eini skapandi pro-sess, sigur Marita Dalsgaard**

## Samrøða



Dagny Joensen
dagnyj@post.olivant.fo

Hóast Marita Dalsgaard eigur tvey smábørn og trý stjúkbørn, trívist hon eisini væl við síni leiklist. Hon sigur stutt sagt, at hon kennir seg best, tá hon arbeiðir við sjónleiki og hevur møguleika at leggja sær arbeiðið til rættis, so hon eisini fær stundir til børn og heimalív.

37 ára gamla Marita Dalsgaard er heppin at hava Olaf Johannesen við sína lið. Tey eru bæði freelance sjónleikarar, og tað ger, at tey kunnu skipa sær arbeiðið soleiðis, at annar teirra næstan altíð er heima hjá børnunum.

Eydnast tað ikki til fulnar onkuntíð, eru ommur og abbar til reiðar at hjálpa.

Sjónleikaraparið býr í sethúsum í Keypmannahavn, har ríkiligt pláss er fyri barnríku familjuni.

Í farnu viku var Marita Dalsgaard í Føroyum við leikinum "Marie Grubbe – en lidenskabelig historie", sum varð framførdur í Klaksvík og í Norðurlandahúsinum.

Tað er "Egnsteatret Masken", sum framleiddi og setti leikin á pall í fjør. Síðani hevur verið ferðast víða um við leikinum, sum hevur fingið sera góð ummæli.

**Løgfrøðiligi og sosiali dómurin**

Um Marie Grubbe, sigur Marita Dalsgaard, at hennara tulking av søguliga høvuðsleiklutinum er øðrvísi, enn hon vanliga hevur verið lýst av ymsum rithøvundum.

- Øll vilja mystifisera Marie Grubbe í hennara sosiala falli. Hon var fødd rík og hevði allar hugsandi møguleikar í lívinum, og kortini skúgvaði hon alt til viks.

- Hon er ung kvinna, sum í veruleikanum sigur ja til alt, sum henni verður boðið, eisini tá pápin áleggur henni at giftast við Ulrik Frederik. Hann var soleiðis tvingaður at giftast við Marie Grubbe.

Í hjúnarlagnum fær hon álvarsligar trupulleikar at berjast við, og hon verður vónbrotin og missir álitið á pápan, sum leiðir dóttrina í ólukku.

Tá tað er greitt fyri henni, tekur hon ábyrgdina og fer frá øllum, frá manninum, familjuni og góðu sosialu umstøðunum.

- Mín tulking er, at Marie Grubbe velur kærleikan fram um sosialu ríkmanstilveruna, fyri frælsi at vera sín egin persónur, sigur Marita Dalsgaard.

- Hóast umstøðurnar í dag eru nógv øðrvísi enn á døgum Marie Grubbe, so eru kortini viðurskifti, sum líkjast enn tann dag í dag.

- Eitt nú um konufólk eru ótrúgv við giftum manni, so verður sætt niður á kvinnuna – og ikki á mannin. Løgfrøðiligi dómurin er ein partur, men kvinnan fær harðari sosialan dóm, eisini í dag.

Marita Dalsgaard heldur tað vera stuttligt at spæla Marie Grubbe, og serliga í Føroyum, av tí at føroyski áskoðarin